Jenis av Rana
Steffan Klein Poulsen
løgtingsmenn

Løgtingið

Uppskot til

Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um veg- og umhvørvisgjald av motorakførum o.a.
(Vektgjald fyri allar persónbilar)

§ 1

Í løgtingslóg nr. 38 frá 31. mars 1982 um veg- og umhvørvisgjald av motorakførum o.a., sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 156 frá 12. desember 2018, verður í § 3 1. og 2. pkt. strikað, og í staðin verður sett: "Fyri motorakfør undir 3.500 kg verður árliga gjaldið rindað sambært gjaldsskrá í skjali 1. Sama er galdandi fyri motorakfør úr 3.500 kg, legu- og viðfestisvognar og motorsúkklur, skrásett áðrenn 1. januar 2017."

§ 2

Henda løgtingslóg kemur í gildi 1. juli 2024.

Almennar viðmerkingar

Orsøk til lógaruppskot
Uppskotsstillararnir hava áður gjørt vart, við hvussu skeivt tann grøni politikkurin vendur. Landskassin hevur seinastu árini stuðlað borgarum til at gera grønar íløgur í elbilar, hitapumpur og jarðhitahol. Hetta hevur kostað landskassanum hundraðtals milliónir, og stuðulin er í allar flestu førum endaður hjá borgarum, sum eru væl fyri. Hetta er sosialpolitikkur, sum vendir á høvdið.

Borgarar fáa tó ikki bara stuðul til sjálva íløguna, tá tað kemur til elbilar. Tí oman á afturbering fyri mvg og lækkað skrásetingargjald, so fáa elbilar eisini rakstrarstuðul ígjøgnum vegskattin frá landinum umframt lægri streymkostnað frá SEV. Hesum seinna ráða kommunurnar tó fult og heilt yvir.

Hóast ein elbilur hevur lítið útlát, meðan hann koyrir, so slítur hann nógv uppá vegakervið í Føroyum. Hetta orsakað av, at elbilar viga nógv meira enn aðrir persónbilar. Av somu orsøk slítast dekkini skjótari á elbilum. Tað er áður komið fram, at smáu gummipartiklarnir frá bildekkum enda úti í náttúruni og dálka umhvørvið, so hvørt dekkini slítast.

Tað vísir seg eisini, at tað kemur minni inn í vegskatti eftir nýggja umhvørvisleistinum samanborið við innkrevjingina eftir vektgjaldi. Tá tann nýggi leisturin ikki tekur hædd fyri hægri vekt og harvið øktum sliti, so fer skipanin ikki at hanga saman sum frálíður.

Av øllum omanfyri nevndum orsøkum samanlagt halda uppskotsstillararnir tað verða neyðugt at gera broytingar í innkrevjingini av vegskatti.

Galdandi lóggáva
Sambært tølum hjá Akstovuni eru 1.841 akfør skrásett við el sum drívmegi tann 01.02.2024. Av hesum eru 72 elprutl. Eitt eldrivið akfar upp til 3.500 kg í heildarvekt (persónbilar) rindar ongantíð meira enn 1.500 kr. í vegskatti.

Hetta er tó ikki galdandi fyri persónbilar, sum hava aðra drívmegi (bensin, diesel, HEV og PHEV). Tey gjalda frá 1.720 kr. til 4.600 kr., um tey eru skrásett áðrenn 2017 (vektgjald) og frá 2.000 kr. til 9.000 kr. um tey eru skrásett eftir 2016 (umhvørvisgjald).

13.938 akfør rinda vegskatt eftir vektgjaldi. 4.224 akfør rinda vegskatt eftir NEDC-leistinum og 9.590 akfør rinda eftir WLTP-leistinum, also tilsamans 13.814 rinda vegskatt eftir umhvørvisgjaldi.

Samanumtikið rindar helvtin av akførunum vegskatt eftir vektgjaldi og hin helvtin eftir umhvørvisgjaldi. Tey, sum rinda eftir eldra leistinum, tað er vektgjaldi, rinda 3.753,06 kr. í miðal pr. akfar, meðan tey, sum rinda eftir nýggja leistinum, tað er umhvørvisgjald, rinda 3.347,83 kr. í miðal pr. akfar. Also elbilar og akfør, sum rinda eftir umhvørvisleistinum, rinda heilar 405,23 kr. minni í miðal pr. akfar enn tey, sum rinda eftir vektgjaldi (sí fylgiskjal 3).

Endamálið
Við uppskotinum verður farið aftur til ta meiri rættvísu skipanina í vegskattinum. Við at innføra vektgjald fyri øll akfør aftur, so rinda allir bileigarar vegskatt sambært tí, teirra bilur slítur vegirnar. Samstundis kemur meira peningur inn í vegskatti, ið verður oyramerktur til viðlíkahald av vegakervinum í Føroyum, sum hevur eitt stórt eftirsleip.

Samandráttur
Við hesum lógaruppskotinum verður farið aftur til, at øll akfør upp til 3.500 kg rinda vegskatt eftir vektgjaldi. Hetta ger, at allir persónbilar verða javnsettir hvør við annan, samstundis sum meiri peningur kemur inn í landskassan í vegskatti. Hesin peningur verður oyramerktur til viðlíkahald av landsvegunum í uppskoti um eykajáttan, sum er lagt fram saman við hesum uppskotinum.

Ummæli
Uppskotið er gjørt út frá tølum, sum uppskotsstillararnir hava fingið frá Akstovuni og egnum útrokningum út frá hesum. Ongin hoyringapartur hevur ummælt uppskotið.

Avleiðingarnar av uppskotinum

Fíggjarligar avleiðingar
Um lógaruppskotið hevði fingið gildi frá 1. januar í 2024, hevði metti inntøkuvøksturin verið 4,4 mió. kr. við at flyta øll akfør undir 3.500 kg frá umhvørvisgjaldi til vektgjald (sí fylgiskjal 3). Lógaruppskotið fær tó ikki virknað fyrr enn frá 1. juli 2024, sum harvið gevur ein inntøkuvøkstur á helmingin, nevniliga 2,2 mió. kr. í ár.

Tá er ikki tikin hædd fyri skjótt vaksandi talinum av elbilum, sum verða skrásettir. Við hesum lógaruppskotinum verður farið frá, at allir elbilar rinda 1.500 kr. um árið, til at teir skulu rinda eftir sínari vekt. Teir elbilar, sum eru skrásettir í dag, fara at liggja ímillum eitt vektgjald frá 2.300 kr. til 4.600 kr. (í miðal 4.143 kr. um árið). Um talið av elbilum veksur við 600 í ár, sum er ein haldgóð meting sambært søguligu tølunum (fylgiskjal 4), og tað verður faldað við økingini í vegskattinum (4.143 – 1.500 = 2.643), so gevur hetta ein inntøkuvøkstur á 1,5 mió. kr.

Við hesum uppskotinum væntast inntøkurnar hjá landskassanum tí at vaksa við 3,7 mió. kr. í 2024. Av tí at øll inntøkan verður oyramerkt til viðlíkahald av føroyska vegakervinum í uppskoti til eykajáttanarløgtingslóg, sum er lagt fram saman við hesum uppskotinum, er talan um ein útreiðsluneutralan “pakka”.

Í 2025 veksur inntøkan við 2,2 mió. kr. afturat inntøkuvøkstrinum í 2024, av tí at lógin tá hevur gildi eitt fult álmanakkaár; umframt vaksandi talið av elbilum, sum eisini gevur meira í landskassan.

Uppskotsstillararnir hava gjørt eina prognosu, sum lýsir, hvønn týdning hækkaði vegskatturin fyri elbilar hevur fyri landskassan, givið at vøksturin í talinum av elbilum er 50% um árið (fylgiskjal 4). Vit tosa beinanvegin um tíggjutals milliónir krónur, um ein slíkur vøkstur í talinum av elbilum gerst veruleiki.

Umsitingarligar avleiðingar
Lógaruppskotið hevur við sær, at innkrevjingin hjá Akstovuni gerst einfaldari, tí farið verður burtur frá at krevja pening inn eftir vektgjaldi og umhvørvisgjaldi til bert at krevja pening inn eftir vektgjaldi. Hetta ger skipanina einfaldari.

Serligar viðmerkingar

Til § 1
Øll motorakfør upp til 3.500 kg skulu frá 1. juli 2024 rinda vektgjald (eftir skjali 1). Tað merkir, at øll akfør sum eru undir 3.500 kg og eru skrásett eftir 31. desember 2016 verða flutt frá umhvørvisgjaldi (skjali 2) yvir til vektgjald (skjal 1). Onki verður broytt fyri akfør omanfyri 3.500 kg.

Til § 2
Áseting um gildiskomu.

Á Løgtingi, 7. mars 2024

Jenis av Rana Steffan Klein Poulsen